UTTAN ÚR HEIMI

## Gongur striltið

Samráðingarnar millum ES øðrumegin og Noreg, Ísland og Liktinstein hinumegin um ein nýggjan handilssáttmála hava verið strævnar.

Fyri hálvari aðru viku síðani fóru partarnir hvør til sítt, tí teir komu ongan veg, og ætlanin var so at hittast aftur í morgin, men tað er ivasamt, um hetta verður av nøkrum. Norski ES-sendiharrin, Bjørn T. Grydeland, segði í gjár, at tað tænir ongum endamáli at fara aftur til samráðingarborðið uttan so, at partarnir hava okkurt at samráðast um. Íslendski sendiharrin í Bruxelles, Kjartan Jóhannsson, heldur kortini, at tað kann loysa seg at fara aftur til samráðingarborðið, tí bara tað at hittast kann kanska skunda undir gongdina, heldur hann.

Tann stóri stríðsspurningurin snýr seg um, hvussu nógv londini og serliga Noreg skal gjalda aftur fyri fría atgongd til tann víðkaða ES-marknaðin. Higartil hevur Noreg víst kravinum hjá ES aftur.

## Munandi fleiri doyðu

Tá ein ferja sakk úti fyri vesturafrikanska landinum Gambia seinasta heyst, varð sagt, at talið á teimum, sum doyðu í vanlukkuni, var beint oman fyri 1.000.

Nú vísa nýggjar upplýsingar, at hetta var ikki so, men at tað veruliga talið var oman fyri 1.800 ella næstan tvær ferðir so stórt. Ferjan var úr Senegal, og forsætisráðharrin gar, Idrissa Seck, segði í gjár, at myndugleikarnir hava higartil skrásett 1.863 lík, sum stava frá vanlukkuni.

Bert 63 fólk sluppu livandi frá vanlukkuni, tá ferjan "Joola" holvdist og sakk í september í fjør. Skipið hevði loyvi at hava 550 ferðafólk, men senegalsku myndugleikarnir viðgingu alt fyri eitt, at alt ov nógv fólk var við ferjuni á vanlukkuferðini.

## Ránsmenn tiknir

Italska løgreglan hevur tikið 38 fólk, sum eru løgd undir at hava steðgað lastbilum á teimum norðuritalsku vegunum og rænt farmin.

Norskir fiskaútflytarar hava seinastu árini kært seg um, at fiskurin, sum teir sendu til Italia, varð rændur, áðrenn hann kom vegin fram, men tað hevur víst seg at vera striltið at fáa italsku myndugleikarnar at taka hetta í álvara. Tað hevur fingið fleiri norðmenn at halda, at løgreglan og ránsmenninir samstarvaðu sum ránini.

Italska løgreglan sigur, at nøkur av teimum 38 vórðu tikin, meðan tey hildu eyga við lastbilum. Sambært løgregluni skuldu hesi varskógva aðrar, sum síðani steðgaðu lastbilunum, meðan uppaftur ein triði bólkur rændi farmin. Sambært løgregluni var tað ein 37 ára gamal italiumaður, sum stóð á odda fyri ránsmonnunum, og teir flestu av medhjálparum hansara eru eisini italiumenn, sigur løgreglan.

## Norðmenn selja

Norska alifyritøkan Dåfjord Laks hevur selt tann partin av virkseminum, sum fyritøkan hevur havt í Danmark.

Talan er um eitt virki, sum hevur skorið laks, eitt roykivirki og eina marknaðardeild, sum Dåfjord Laks hevur havt í Skagen seinastu árini. Leiðslan í fyritøkuni sigur, at hon fer nú at menna marknaðardeildina á høvuðsskrivstovuni í Tromsø ístaðin fyri.

Dåfjord Laks fekk 35 milliónir krónur burtur úr at selja tær tríggjar deildirnar í Skagen.

# Columbia var deyðadømd longu frá byrjanini

**Hitaverjan undir vinstra vonginum virkaði ikki, sum hon skuldi, tá rúmdarferjan kom aftur í atmosferuna. Nógvur hiti og hol í skjøldrinum gjørdu, at ferjan fórst**

COLUMBIA-VANLUKKAN
*Árni Joensen*

Alt fleiri tekin benda á, at brekið, sum rúmdarferjan "Columbia" fekk, beint eftir at hon varð skotin út í rúmdina, var tað, sum 16 dagar seinni gjørdi enda á henni og teimum sjey, sum við vóru.

80 sekund aftan á sjálva útskjótingina tann 16. januar loysnaði eitt hálvan metur langt stykki av bjálvingini á brennievnistanganum á "Columbiu" og rakti vinstra vong. Hetta sá rúmdarumsitingin NASA, men vildi vera við, at hetta hevði onga ávirkan á trygdina hjá ferjuni.

Men nú bendir nógv á, at tann serliga bjálvingin, sum skuldi verja rúmdarferjuna ímóti tí nógva hitanum, sum ferjan kom í, tá hon kom inn í atmosferuna, hevði fingið so mikið av skaða, at hon helt ikki. Eitt tekin um hetta er, at beint undan vanlukkuni varnaðist eftirlitið í Houston, at hitamátararnir í hjólrúminum undir ferjuni virkaðu ikki.

Fyrradagin almannakunngjørdi NASA ymsar tekniskar upplýsingar, sum váttaðu gitingarnar um, at vinstri vongur á ferjuni virkaði ikki, sum hann skuldi, og at hetta eftir øllum at døma stóðst av skaðanum, sum vongurin fekk, beint eftir at "Columbia" var skotin út.

Serfrøðingarnir hjá NASA vóna nú at finna so nógv vrakpetti av "Columbiu", at teir seta sum mest av henni saman í einari roynd at finna, hví ferðin fekk ein so vanlukkuligan enda.



*Um allan heim hevur verið skipað fyri minningarhaldi eftir vanlukkuna við "Columbiu". Hendan myndin er frá minningarhaldi í Moskva. Maðurin fremst á myndini er amerikanski sendiharrin í Moskva, Alexander Vershbow*

*Mynd: Reuters*

**Skulu halda fram**

Stjórin í rúmdarumsitingini, Shean O'Keefe, segði í gjár, at umsitingin fer at kanna málið út í æsir. Hann avsannaði samstundis skuldsetingar um, at NASA skal hava slakað í trygdini seinastu árini, tí politikararnir høvdu skert játtanina til rúmdarverkætlanir. Ein óheft nevnd, sum kannaði trygdina í amerikansku rúmdarverkætlanini í fjør, kom annars til ta niðurstøðu, at vandin fyri vanlukkum var vorðin størri, enn hann hevði verið, tí minni dentur varð lagdur á trygdina.

Avvarðandi hjá teimum sjey, sum doyðu við "Columbiu", hava mælt NASA til at halda fram við sínum arbeiði. Í einari felags fráboðan, sum Evelyn Husband las upp, stóð, at kanningarnar í rúmdini eiga at halda fram, so skjótt orsøkin til vanlukkuna við "Columbiu" er funnin og brekini rættað. Maður hennara, Rick Husband, var skipari á "Columbiu".

# Nú fiska teir aftur

UMHVØRVISDÁLKING
*Árni Joensen*

Fiskimenninir á sponsku norðurstrondini eru nú farnir útaftur

Tá tangaskipið "Prestige" sakk úti fyri sponsku útnyrðingsstrondini fyri hálvum triðja mánað síðani, fingu fiskimenninir har á leiðini forboð fyri at fiska, og síðani hava túsundtals fiskimenn gingið hendur í favn.

Mánadagin varð forboðið sett úr gildi á einari leið frá portugisiska markinum og einar 100 kilometrar norðureftir. Nógvir fiskimenn loystu alt fyri eitt, men minni enn so allir kenna seg tryggar enn. Teir hava ikki álit á boðunum frá myndugleikunum um, at nú ber til at fiska aftur.

Fiskimenninir bera eisini ótta fyri, at oljudálkingin skal gera um seg aftur, nú sardin- og makrelvertíðin nærkast.

# Bush vil hava arabiska sjónvarpsstøð

TÍÐINDAFLUTNINGUR
*Árni Joensen*

George W. Bush, forseti hevur biðið kongressina um 208 milliónir dollarar til at fíggja eina arabiska sjónvarpsstøð, so arabarar kunnu fáa tíðindi, soleiðis sum amerikanarar halda, at tey eiga at vera

Hugskotið til sjónvarpsstøðina er komið úr uttanríkisráðnum í Washington, og støðin skal verða liður í einari verkætlan, sum hevur til endamáls at kunna og ávirka fólk í øðrum londum.

Sambært verkætlanini, sum var almannakunngjørd mánadagin, skulu fólk í fleiri arabiskum londum fáa møguleika at síggja ta nýggju sjónvarpsstøðina. Støðin skal eisini senda reklamur og kann sostatt loysa tann tann trupulleika, sum amerikanska stjórnin hevur, tí tey almennu arabisku sjónvørpini sýta fyri at senda reklamur.

- Síðani tann 11. september hava vit sæð, at USA hevur mist sína ávirkan á nógv fólk, sum hava eina aðra uppfatan av okkara virðum, okkara politikki, og hvussu vit bera okkum at. Gjógvin millum teirra og okkara egnu uppfatan er vorðin so stór, at hon er vandamikil, og hetta hevur órógvað arbeiðið hjá uttanríkisráðnum á nógvum økjum, sum hava við ta tjóðskaparligu trygdina at gera, stendur í skjølunum hjá uttanríkisráðnum í Washington.



HYGG HER
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Citroen Saxo 1,5D 3h
km. 120.000, grønur, jul'97
80.000,-

Citroen ZX 1.9TD 5h
km. 163.000, grønur, mai'97
85.000,-

Volkswagen Vento 1.9d
km. 82.500, gráur, apr'94
71.000,-

Citroen Xsara 1.9 td week
km. 77.000, gráur, okt'98
115.000,-

Suzuki Baleno 1.3i
km. 27.500, gráur, apr'00
99.000,-

Citroen Saxo 1.5D 3d
km. 44.000, gráur, jan'01
99.000,-

Citroen Xsara 1.9td
km. 110.000, reyður, aug'98
115.000,-

Toyota Corolla 1.3i
km. 24.000, svartur, feb'02
103.000,-

VØRUVOGNAR

Citroen Jumper 2,5TD
km. 120.000, reyður, 1996
120.000,-

Nissan Serena 2,3D
km. 88.000, bláur, mai´97
88.000,-

Nissan Serena 2,3D
km. 102.000, bláur, mai´97
88.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820

Avloysari til Goymsluna á Føroya Tele

"Viðskiftafólk eru ikki viðskiftafólk. Viðskiftafólk eru menniskju"
Ókendur



Fyri starvsfólk í farloyvi verður søkt eftir avloysara í eitt ár til goymslu okkara á Hálsi í Tórshavn at byrja 1. mars 2003 ella skjótast møguligt.

Uppgávurnar eru:
Vøruútflýggjan, skráseting og annars alt vanligt goymsluarbeiði.

Førleikakrøv:
Umsøkjarin skal hava goymsluútbúgving, ella hava royndir innan goymslu ella líknandi. Dentur verður lagdur á, at tann sum sett/-ur verður, kann veita eina góða tænastu, kann arbeiða sjálvstøðugt og arbeiða væl saman við øðrum. Koyrikort er kravt.

Fyrimunur er at:
· hava EDV-kunnleika á brúkarastøði
· vera røkin
· duga enskt

Føroya Tele kann bjóða eitt starv
· í einum mennandi umhvørvi
· við fakligari og persónligari menning
· í góðum arbeiðsumhvørvi

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran á Goymsluni, Heina Eliasson Egholm, ella til Starvsfólkadeildina. Tlf. 303030.

Umsókn við avritum av prógvum og møguligum ummælum skal vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 7. februar 2003.

Umsóknirnar skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýrið eigur 100%. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ymiskum støðum kringa alt landið. Goymslan á Føroya Tele tekur sær í høvuðsheitum av innanhýsis sølu og innkeypi til tær ymisku deildirnar á Føroya Tele. Høvuðsvørur okkara eru jørðkaðalar, transmissiónútgerð, alskyns telefonlutir, installatiónútgerð, skrivstovulutir og mangt annað. Á Goymsluni starvast 5 fólk.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!

Fyrstahjálp

Víðka skeið 20 tímar (fortreyt: lokið grundskeið ikki eldri enn 1. august 2001):
Byrjar 1. febr. 2003 (1. og 2. + 8. og 9. mars)

Sálarlig 1. hjálp:
Byrjar 15. febr. kl. 14-16 verður annars:
20. febr.: kl. 19-21,
22. febr.: kl. 14-16 og
27. febr.: kl. 19-21.

Um ov lítil tilmelding er, verða skeiðini ikki hildin.

Tilmelding á tlf. 319630, Fax. 311217
Teldupost: redcross@redcross.fo.

Reyði Krossur Føroya

Húsini í Onnug. 3 í Hoyvík til sølu



Støddin á húsunum er 178 + 59 fermetrar
Loft: Loftsrúm 59 fermetur
Miðhædd: Gong, køkur, grovkøkur, stova, hjúnarúm v/wc, gosbaði og saunarúmi, tvey kømur, brúsa/wc og vaskirúm
**Tilsamans 178 fermetrar + hjallur og kjallari/fýrrúm**
Kjallari: Eingin
Grundøki: 550 fermetrar
Byggiár: 1986

Húsini verða sýnd fram: leygardagin 8. februar frá kl. 17-20

*Meira fæst at vita við at ringja á tlf. 225429 og 448001*




Ístaðin fyri at keypa nýtt



Vit lakera alt innbúgv, so tað verður sum nýtt.

Skápshurðar og innhurðar

Ein bíligari loysn

Auto-Tek
Argjaboðagøta 5 · Tlf. 321206 · fax 321236 eftir kl. 17.00 á Tlf. 221006

www.sosialurin.fo

<ph_1>